# Hergeir Nielsen sigur kortanei

**Einasta tingmaður úr samgonguni í Suðuroynni ger púra greitt, at hann fer ikki at atkvøða fyri fíggjarlógini, soleiðis sum hon nú er. Verður fíggjarlógin ikki broytt, fer hon sostatt at fella í tinginum**



*– Uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár er ikki borðbart, sigur Hergeir Nielsen, sum ikki fer at atkvøða fyri fíggjarlógini, verður hon ikki broytt*

FÍGGJARLÓGIN
*Áki Bertholdsen*

– Eg atkvøði ikki fyri fíggjarlógini, sum nú nú sær út.

Hergeir Nielsen, einasti tingmaður úr Suðuroynni, sum er í samgongu, ger púra greitt, at hann tekur ikki undir við uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár, sum landsstýrið hevur lagt fram.

Og hann ger samstundis púra greitt, at hann fer ikki at atkvøða fyri fíggjarlógini, soleiðis sum hon nú sær út.

Tað, sum hann er so misnøgdur við, er at ikki eitt oyra er sett av til samferðsluhavnina í Vági.

– Eg havi gjørt heilt greitt á samgongufundi, at hetta kann eg ikki góðtaka sigur Hergeir Nielsen.

Vil tað so siga, at tú setir samgonguna í veð fyri at fáa pening játtaðan til hesi endamálini?

– Tað havi eg ikki sagt. Men eg kann bara vísa á, at tað skulu 17 atkvøður til fyri at fáa meiriluta fyri fíggjarlógini og tað eru ikki meiri enn 17 tinglimir í samgonguni. Sostatt er neyðugt at full semja er um fíggjarlógina, annars verður hon ikki samtykt, so onkustaðni fer at standa á.

Hergeir Nielsen sigur, at hann tískil fer at virka fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag so at samferðsluhavnin í Vági ikki dettur niðurfyri.

– Vit fáa trupulleikar longu í vetur av, at vit ikki hava tvær ferjulegur í Suðuroynni. Clare skal sigla á Tvøroyri eisini og tá ið høvuðsferðslan er fríggjakvøld, koma bæði Clare og Smyril á Tvøroyri ísenn.

Tú sigur Hergeir Nielsen, at Suðuroyggin hevur heilt avgjørt brúk fyri tveimum ferjulegum.

Hann vísir eisini á, at fyri løgtingsvalið samtykti eitt einmælt Løgting at játta pening til samferðsluhavnina í Vági.

– Sostatt var tað eitt samt løgting, sum vil hava samferðsluhavnina í Vági. Og tað fóru eisini allir flokkar til val upp á at havnin skuldi gerast í Vági, eisini sum eitt lið í økismenningini.

– Vágur fekk ongantíð lut í Fiskavirking, sum setti gongd á aftur alt samfelagið, uttan syðru helvt í Suðuroy, sum kom at sita eftir við einum stongdum virki. So ein samferðsluhavn í Vági er tað minsta endurgjaldið, sum tað almenna kann lata Vági afturfyri.

– Vit fáa ikki fatur aftur á tí fólki, sum er farið. Men tað ber til at endurskapa teir vinnuligu møguleikarnar sigur Hergeir Nielsen.

Og tað er eisini eitt annað í hesum og tað er, at tá ið avgerðin varð tikin um at gera samferðsluhavnina í Vági, var tað tí at vit sóu okkum ikki før fyri at gera tað stóru samferðsluhavnina á Tvøroyri. Ætlanin var so at Smyril skuldi sigla á Vág í fyrstuni, men tá ið ferjulegan á á Tvøroyri var liðug, skuldi Smyril sigla har.

– Tað var Landsstýrið sum bað um at sleppa upp í ætlanina hjá Vágs Kommuna at byggja havnalagið út so at ein samferðsluhavn varð gjørd samstundis. Vágs Kommuna hevur síðani tikið stig til at landið kundi vera við. Tí er tað ikki politiskt borðbart at leypa frá. At leypa frá nú, er ikki reinført politiskt og er at halda fólk fyri gjøldur, sigur Hergeir Nielsen.

# Tingmenn úr Eysturoy vilja boyggja seg fyri veruleikanum





*Teir báðir samgongutingmenninir úr Eysturoynni, Jógvan á Lakjuni og Tórbjørn Jacobsen eru samdir um, at tað er betri at siglingin inn á Skálafjørð verður niðurløgd enn at hon heldur fram sum nú*

**Skálafjarðarsiglingin eigur ongan góðan og so er líka frætt, at hon verður niðurløgd, siga tingmenn úr Eysturoy**

SKÁLAFJARÐAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Nú er tað mangt, sum bendir á, at siglingin hjá Strandferðsluni ímillum Havnina og Skálafjørðin, fer í søguna.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur boðað frá, at hann ætlar at leggja uppskot fram um at broyta lógina um farma- og fólkaflutning, so at Strandferðslan ikki longur skal hava skyldu til at sigla ímillum Skálafjørðin og Havnina.

Hann hevur havt málið fyri á landsstýrisfundi og sambært Útvarpinum metir hann seg hava undirtøku í samgonguni fyri ætlanini. Hann sigur, at verður siglingin niðurløgd, fer tað at spara landskassanum fimm milliónir, sum hann ístaðin ætlar at brúka upp á vegin ímillum Skála og Strendur.

Skálafjaðrarsiglingin hevur verið í nógv ár verið eitt heitt politisk epli. Fleiri ferðir hevur ætlanin verið at leggja hana niður, tí hon gevur so stórt undirskot, samstundis sum bussar koyra allan dagin, men hvørja ferð hava tingmenn í Eysturoy barst so hart ímóti, at higartil er onki komið burturúr ætlaðu niðurleggingunum.

Men nú tykist sum um vend er komin í.

Vit hava tosað við tveir Eysturoyartingmenn úr samgonguni og hvørgin teirra fer at seta seg ímóti, at siglingin verður niðurløgd.

Bæði Jógvan á Lakjuni í Fuglafirði og Tórbjørn Jacobsen á Glyvrum, vóru við til at leggja uppskotið fyri tingið um at áleggja Strandferðsluni at sigla ímillum Havnina og Skálafjørð.

Men nú siga teir báðir, at teir góðtaka, at siglingin verður niðurløgd.

### Ongan góðan

Teir halda báðir, at skálafjarðarsiglingin hevur ongan góðan átt. Og teir eru eisini samdir um, at politiskur vilji er ikki til staðar at brúka neyðuga peningin til at lyfta siglingina upp á eitt støði sum ger, at hon er til veruliga nyttu.

– Vit mugu ásanna, at tað er neyðugt at taka skálafjarðarsiglingina upp til nýggja viðgerð, tí hon kann ikki halda fram sum nú, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann sigur, at tað er lítil og ongin politiskur vilji til at varðveita siglingina.

– Skipið, sum er, kann ikki brúkast og tað skal nógvur peningur til at fáa eitt hóskandi skip og tann peningin er vilji ikki til at brúka.

– Tað er heldur ongin vilji til at bjóða siglingina út. Ein roynd varð gjørd, men tað var hálvhjartað, tí tað fylgdi ov lítil peningur við.

Hartil hevur leiðin verið ótrygg og hevur ligið still í langa tíð inn ímillum.

– Antin mugu vit brúka neyðuga peningin til at fáa eina veruliga rutu, ella má hon niðurleggjast. Og eg dugi ikki at síggja nakran vilja til at gera eina veruliga rutu, sum kann vera eitt álit hjá ferðafólki og tí fari eg ikki at seta meg upp ímóti at hon verður niðurløgd, sigur Jógvan á Lakjuni.

Men hann ásannar, at tað verður keðiligt hjá teimum fólkum, sum brúka rutuna.

Hann heldur, at tað er eitt gott hugskot at brúka peningin til at gera vegin ímillum Skála og Strendur.

– Eg haldi at tað er skilagott og djarvt at landsstýrismaðurin reisur málið, tí vit mugu eisini ansa eftir, at ikki alt fer á glið.

### Hongur ikki saman

Tórbjørn Jacobsen sigur, at hann hevur sjálvur heitt á landsstýrismannin í vinnumálum um at leggja siglingina inn á Skálafjørðin niður.

– Eg dugi ikki at síggja nakra meining í at siglingin heldur fram, sum hon ger nú, tí nú er onki álit í henni, tí skipið er óbrúkiligt og ferðasambandið liggur javnan stilt.

– Eg dugi heldur ikki at síggja, hvussu tað skal vera til hjá samgonguni at seta neyðuga peningin av til eitt skip, sum kann brúkast til siglingina, tí tað kostar næstan 100 milliónir, skal tað eisini vera ført fyri at flyta stórar bilar og bingjur.

– Tað er betri, at hon verður niðurløgd enn at hon heldur fram sum nú, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann vísir eisini á, at tað hongur ikki saman, at summir partar í landinum ikki hava nóg gott samband, men at eysturoyingar skulu krevja gott sjóvegis samband afturat tí at bussar koyra fleiri ferðir um dagin so at teir sleppa ímillum so ofta, teir vilja.



# Flakavirkini ikki skyldina av lágum fiskaprísum

**- Nógvir bátar og skip hava í alt ov lítlan mun lagt seg eftir at røkja føroyska marknaðin, men hava í staðin valt at fara har, prísurin er hægstur. Og tá nú prísurin á bretska marknaðinum skramblar niður, kunnu tey ikki vænta, at føroysku flakavirkini skulu lofta teimum. Tað sigur Ráfiskakeyparafelagið í viðmerking til Reiðarafelagið, sum í seinastuni hevur funnist at føroyskum fiskakeyparum, sum hava møguleika at avtala fiskaprísirnar sínamillum, tí skipini eru bundin at selja part av síni veiðu í Føroyum**

FISKIVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tað hevur vakt ans í Ráfiskakeyparafelagnum, at formaðurin í Reiðarafelagnum herfyri í viðtalu við Sosialin førdi fram, at fiskakeyparar hava møguleika at »rotta seg saman« og avtala keypsprísir sínamillum, tí teir vita, at tað ber ikki til hjá skipunum at fara á útlendskan marknað, tá teimum lystir.

Agnar Jensen, sum umboðar Ráfiskarakeyparafelagið í Vinnuhúsinum, vísir aftur orðini hjá Reiðarafelagnum:

- Hørð kapping er um hvørt kilo av fiski, og eru flakavirkini ikki kappingarfør, so fáa tey onga rávøru, sigur Agnar Jensen. Hann vísir á, at fiskivinnan á landi hevur fleiri avmarkingar. Millum annað er tað ómøguligt hjá føroyskum flakavirkjum at hava lønandi rakstur við útlendskari rávøru, og tí hava virkini bara føroysk skip sum rávøruveitarar. Virkini kunnu so antin velja at keypa frá føroysku skipunum ella at leggja stilt. Harafturímóti kunnu skipini í stóran mun velja, um tey vilja selja til føroysk ella útlendsk virkir. Og eru føroysku virkini ikki kappingarfør, so fáa tey ikki eitt kilo av fiski, vísir Agnar Jensen á.

- Harumframt fer sera nógvur fiskur óvirkaður av landinum, sigur Agnar Jensen og nevnir sum dømi, at tey fýra árini frá 1996-99 fóru í meðal 26.000 tons av botnfiski óvirkað av landinum um árið. Agnar Jensen leggur afturat, at bara fyrstu sjey mánaðirnar í ár fóru góð 21.000 tons av botnfiski óvirkað av landinum, og heldur henda gongd sær, sum tað eisini sær út til í løtuni, fer samlaði útflutningurin av óvirkaðum botnfiski at tátta í 40.000 tons, tá árið er av. Árið í ár verður sostætt metár fyri útflutningin av óvirkaðum fiski úr Føroyum.

Agnar Jensen sigur, at føroysku flakavirkini í longri tíð hava verið noydd at staðfesta, at tey standa seg ikki í kappingini um henda fiskin, og hava tí lagt seg eftir aðrari framleiðslu. Tí er tað ov vánaligt, at skipini nú, tá prísurin á marknaðum uttanlanda fellur, ákæra føroysku flakavirkini fyri at avtala prísirnar sínamillum, og ikki vilja geva ein rímiligan prís, heldur hann.

### Serrættindi og skyldur

Samskiparin í Ráfiskarafelagnum vísir á, at skip og reiðarí fáa tillutað eitt fiskiloyvi og fiskidagar. Hetta eru rættindi, sum bara ein ávísur partur av vinnuni fær. Samtíðis verða nakrar bindingar lagdar á skipini um, hvussu tey kunnu selja, men tað eru bindingar, sum eru knýttar at serrættindunum. Tí er tað avgjørt ikki ov nógv at krevja at føroyskir fiskakeyparar í øllum føri sleppa at bjóða uppá 75 prosent av veiðuni undir Føroyum.

- Flakavirkini vilja ikki hava nøkur serrættindi, vit vilja bara hava javnbjóðis møguleika at sleppa at bjóða uppá fiskin undan Føroyum, sigur Agnar Jensen, og leggur afturat, at tað at sleppa at bjóða, als ikki er tað sama sum at sleppa at keypa. Tað vísa mongdirnar av fiski, sum fer óvirkaður av landinum, heilt greitt, sigur Agnar Jensen.

Samskiparin í Ráfiskarakeyparafelagnum leggur afturat, at um stóru mongdirnar av óvirkaða botnfiskinum fara av landinum í fríari kappini á jøvnum støði, so er ikki so nógv at siga til tað. Men hann vísir tó á, at serrættindi, bæði í Føroyum og í grannalondunum geva útlendskum fiskakeyparum beinleiðis fyrimun í kappingini um føroyska fiskin. Sum dømi nevnir hann, at í ES-londunum skal allur feskur heilur fiskur, sum verður landaður ella seldur, skiljast eftir góðsku og stødd, áðrenn fyrstu sølu. Men henda binding er ikki galdandi í Føroyum. Hetta ger, at ES virkir, sum eru kappingarneytar hjá føroysku virkjunum, hava ein greiðan kappingarfyrimun til at keypa føroyskan fisk, metir Agnar Jensen.

## Johnny er nú á veg niðan í Himmalaya

**Seint mánakvøldið kom vestmenningurin Johnny Joensen, sum hevur sett sær fyri at klíva upp á 7129 metra høga fjallið Baruntse í Himmalaya, til Nepal. Tilsamans 12 fólk, Johnny og 11 danir, eru í ferðalagnum. Heldur óvæntað var føroysk móttøka fyri teimum á flogvøllinum í nepalska høvuðsstaðnum Kathmandu**



*Mánakvøldið kom vestmenningurin Johnny Joensen til nepalska høvuðsstaðin Kathmandu. Her er hann avmyndaður á flogvøllinum í Kathmandu, saman við føroysku hjúnunum Jan á Argjaboga og Torgunn Kragesteen, umframt Kristinu Kristiansen og dótturini Rósu, sum eru á vitjan í Nepal*

FJALLAKLINTRARI
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Eftir drúgvar fyrireikingar er tað nú álvara hjá 27 ára gamla vestmenninginum Johnny Joensen, sum hevur sett sær fyri at klíva upp á 7129 metra høga fjalllið Baruntse í Himmalayafjøllunum.

Um hálvgum tólv tíðina lokala tíð mánakvøldið setti flogfarið við Johnny Joensen og hinum í ferðalagnum seg í nepalska høvuðsstaðnum Kathmandu. Tað var ikki sørt, at tey vóru bilsin yvir móttøkuna, tey fingu á flogvøllinum, har føroyingar tóku ímóti, veittrandi við Merkinum.

Á flogvøllinum stóðu føroysku hjúnini Jan á Argjaboga og Torgunn Kragesteen, sum búgva í Nepal, har Jan arbeiðir fyri felagsskapin Danida. Á flogvøllinum stóðu eisini Kristina Kristiansen og dótturin Rósa, sum eru á vitjan hjá Jan og Torgunn í Nepal.

- Vit høvdu hoyrt graml um, at Johnny og restina av ferðalagnum vóru á veg til Nepals, og tí hildu vit, at vit skuldu fara at taka ímóti teimum á flogvøllinum, sigur Jan úr telefonini úr Nepal. Tað er siður í Nepal at geva ferðafólki ein blómukrans um hálsin, tá tey koma til landið, og føroysku hjúnini hildu eisini, at tey skuldu halda henda góða sið.

Týsdagin skuldu Johnny og hini í ferðalagnum nýta til at keypa ymiskt, sum tey skulu hava við á túrinum, og annars taka sær av løttum, áðrenn farið varð víðari mikudagin.

Ferðalagið hevur sett fýra vikur av til túrin, sum byrjar heilt niðri í láglendinum. Tey skulu ganga um dalar og fjøll, áðrenn tey fara at klíva sjálvt Baruntse fjallið. Johnny Joensen sigur, at veruliga royndin kemur ikki, fyrr enn teir síðstu 2-3000 metrarnir skulu klívast í kava og ísi. Og trupult verður tað eisini, tá komið er upp í 6000 metra hædd og tunna luftin sýgur alla megi úr kroppinum. Tunnu luftina sær Johnny sum sína størstu avbjóðing á túrinum.

## Teitur Lassen heiðursbræv fyri ársins átak

**Tónleikarin Teitur Lassen fekk á vinnudegnum fríggjadagin heiðursbræv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri Ársins Átak. Tað fekk hann, fyri í juni at hava megnað at fáa í lag sáttmála við plátufelagið Universal Record**




ÁRSINS ÁTAK
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Á øðrum sinni lat Vinnuhúsið fríggjadagin eitt heiðursbræv til tað, sum vinnan metir vera ársins átak. Hesaferð gjørdist tað Teitur Lassen, sum fekk henda heiður. Í sínum grundgevingum fyri at lata Teiti Lassen henda heiður, segði dómsnevndin millum annað:

Árið í ár hava føroyskir tónleikabólkar av álvara gjørt um seg uttanlands. Klaksvíksingurin Pætur við Keldu var á toppinum í danska "melodi grandprix". Bólkurin Týr gjørdi "Ormurin Langa" til landaplágu í Íslandi. Bólkurin Clickhaze hevur spælt á fleiri festivalum í Danmark. Og Brandur Enni hevur eisini gjørt um seg bæði í Danmark og Íslandi.

Eftir okkara tykki er tað Prix Føroyar kappingin, sum eigur stóran part av æruni fyri hesum frambrotum. Endamálið við hesari kappingini, sum verður hildin annað hvørt ár, er at hækka støðið innan tónleik í Føroyum. Og tað má sigast at vera eydnast.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ár valt at heiðra tað, sum eftir okkara tykki, er størsta tónleikaavrikið hetta árið. Ársins átak verður í ár givið til ein ungan solist, sum í juni mánað skrivaði hann undir sáttmála við stórt amerikansk plátufelag – Universal Record. Talan er um ein sáttmála uppá tvær fløgur, sum verða útgivnar í allari verðini. Og talan er um rættuligar fittar upphæddir í peningi.

Kendi føroyski tónleikaprodusarin Óli Poulsen sigur, at hetta er ein framúr møguleiki hjá unga føroyinginum. Hann fær her møguleika at framleiða tvær fløgur undir best møguligum umstøðum, og marknaðarføringin av fløgunum fylgir við.

Keldur innan danska tónleikaheimin siga, at tað í norðanlondum man vera eindømi, at ein solistur, sum ikki hevur havt løg á hittlistanum, fær eina slíka kontrakt.

Solisturin talan er um hevur júst verið í Spania og tikið fyrstu fløguna upp. Hann er nú staddur í Los Angeles, har han saman við produsara sínum Rupert Hini, er í gongd við at liðugtgera fyrstu fløguna. Solisturin talan er um er Teitur Lassen.